# Kunngerðablaðið A

2022 Givið út 2. september 2022

Nr. 122 29. august 2022

**Kunngerð um broyting í kunngerð um grind og annan smáhval (Grindakunngerðin)**
(Møguleiki fyri bráðfeingis banni og áseting av mest loyvdari veiðu av skjórutum springara o.a.)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 9 frá 26. januar 2017 um grind og annan smáhval (Grindakunngerðin) verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 7, stk. 1, 3. pkt., § 22, § 49, stk. 2 og 3 og § 51, stk. 3 verður "Náttúrugripasavninum" broytt til: "Havstovuni".

**2.** Í § 7, stk. 1 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Sýslumaðurin skal somuleiðis gera vart við, hvussu nógvir skjórutir springarar eru veiddir í árinum og møguligt forboð fyri at veiða fleiri skjórutar springarar sambært § 50, stk. 2."

**3.** § 12 verður orðað soleiðis:

"**§ 12.** Landsstýrismaðurin kann loyva sýslumanni at lýsa bráðfeingis bann fyri grindadrápi í ávísari hvalvág í upp til 3 mánaðir, um nóg mikið av grind er í grindaumdøminum, sum hoyrir til hvalvágna. Bráðfeingis bann skal lýsast í Kringvarpi Føroya."

**4.** Í § 25, stk. 1 verður "Náttúrugripasavnið" broytt til: "Havstovan".

**5.** Í § 50 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Loyvt er at taka og veiða í mesta lagi 500 skjórutar springarar hvørt álmanakkaár í ávikavist 2022 og 2023. Frá 2024 verður veiðan ásett eftir tilmæli frá NAMMCO um burðardygga veiðu. Landsstýrismaðurin kunnar skrivliga sýslumenn og grindaformenn um samlaða talið av veiddum skjórutum springarum í árinum."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 29. august 2022

**Árni Skaale (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)